Vánalig byrjan hjá Súna

Nýggja felagið hjá Súna Olsen, Viborg FF, fekk als ikki nakra dreymabyrjan á Superliguna eftir langa vetrarsteðgin. Sterka útivallarliðið, Esbjerg FB, var og vitjaði Súna og teir grønu í Viborg. Súni slapp á vøllin í 56. minutti fyri ungarska høgra bakkin Zoltan Balog. Hetta tíðarbilið var Viborg longu aftanfyri 3-0, og meðan Súni var á vøllinum fekk Esbjerg enn eitt mál, soleiðis at Viborg tapti heili 4-0.

Bayern varð lumpað

Venjarin hjá týska stórfelagnum FC Bayern tosar nú alment við stórum bókstavum, eftir at sterka oddaliðið púra óvænta tapti 2-0 ímóti lítla felagnum Cottbus um vikuskiftið. - Cottbus spældi við hjartanum, og eg eri sera, sera vónbrotin av mínum liði. Spælararnir halda eftir øllum at døma, at meistaraheitið kann vinnast uttan trupulleikar, segði ein argur Hitzfeldt eftir dystin leygardagin.

støðumenn

Áðrenn teir komu til Føroya, vóru teir liðfelagar í donskum hondbólti. Nú eru teir lyklaspælarar á hvør sínum liði, tá FM-finalurnar í manshondbólti byrja skírisdag

Mynd: Álvur Haraldsen

FAKTA

Navn: Jacob Larsen
Føddur: 24. februar, 1979
Felag: Neistin
Pláss: Málverji
Ættaður: Danmark, Nykøp ing Falster
Búsitandi: Tórshavn

avgerðina síðan.

Er tað nakað, sum hevur verið gjørt tykkum bilsnar við Føryoum?

DE: Náttúran er sera vøkur. Fólkini eru eisini sera fitt og blíð. Tað eru væl fleiri og større fjøll her enn í Danmark, men tað venur tú teg við alt fyri eitt.

JL: Ja, eg kann einans taka undir við David. Hatta er fyrimunurin við at svara spurningunum fyrst...

Er møguleiki fyri at síggja tykkum í føroyskum hondbólti í komandi kappingarári eisini?

DE: Ja. Avtala er longu fingin í lag við StÍF um, at eg spæli her í næsta ár eisini.

JL: Nú kom eg til Føroya í síðstu løtu, og tað eru framvegis ymisk viðurskifti í Danmark, sum eg má fáa í rættlag. Einki er avgjørt, men eg hevði gleðiliga verið í Føroyum eitt ár aftrat.

Vandamikið

Hvørja fatan hava tit av føroyskum hondbólti?

JL: Støðið er hægri, enn eg var vanur við í Nykøping Falster, tá eg spældi har. Eg havi eisini ofta undrast yvir, hvussu nógv krút er í nærdystunum her.

DE: Ja, eg má líka bróta Jacob av. Tað er ótrúligt, hvussu harðligir føroyingar eru á vøllinum. Og at dómararnir loyva tí. Tit eru væl vandir, tað má sigast. Tað verður hildið í troyggjunum og skumpað av øllum alvi.

Hvat hevur gjørt tykkum mest bilsnar við føroyskum hondbólti?

DE: Ja, serliga hetta við, hvussu føroyingar spæla við musklunum. Annar hvør nærdystur í Føroyum hevði verið til eina útvísing í donskum hondbólti. Summar tíðir er spælið kanska ov hart.

JL: Ja, tað burdi verið nakað fyri David at skumpa eitt sindur. Men tað er stórur munur á hondbóltinum her og í Danmark. Tað er ofta beinleiðis vandamikið at vera á vøllinum í Føroyum. Tað er løgið, at fleiri skaðar ikki eru.

Meta tit, at nakar føroyskur leikari hevði staðið seg í oddinum í donskum hondbólti?

DE: Sveinur Justinussen úr StÌF, heilt vist. Eg kann ikki reiðuliga hugsa um nakran annan nú. Jacob Larsen kanska eisini, hehe. Annars høvdu toppliðini í Føroyum eisini klárað seg í næstbestu deildini í Danmark, meðan tey niðaru, sum KÍF, VÍF og H71, høvdu stríðst um uppflyting millum tey triðbestu.

JL: Eg vildi sagt Finnur Hansson, um hann fekk eitt sindur meira av kjøti á kroppin. Carl Herup Olsen úr Neistanum eisini. Hann hevði staðið seg á vonginum. Tað eru heilt vist eisini fleiri, sum høvdu klárað seg í næstbestu deildini.

Claus ikki fyrimunur

Jacob, hvat verður avgerandi, um Neistin skal rópa seg føroyameistara í 2008?

- Vit hava verið ógvuliga skiftandi higartil. Tað gongur ikki í einari finalu. Verjan hevur staðið væl, men álopið hevur ikki verið nøktandi. Vit hava hinvegin ein breiðan og evnaríkan hóp av leikararum, og tað er sera umráðandi.

David, somuleiðis til tín – hvat verður avgerandi fyri StÍF?

- Tað er av stórum týdningi, at vit lyfta okkara botnstøðið. Tað hevur verið ov skiftandi. Tað riggaði sera væl í verjupartinum hjá okkum í byrjanin av kappingarárinum. Vit mugu finna tað ágangandi spælið aftur. Snarálopini verða eisini avgerandi. Hópurin er ikki serliga breiður, og vit mugu ikki fáa skaðar. Men sjálvsagt, verður alt soleiðis, sum eg greiði frá her, so vinna vit trygt.

Hvør leikari fær avgerandi týdning í finalunum og hví?

DE: Ingi Olsen, heilt vist. Hann hevur eginleikan at koppa einum dysti. Hann kann avlevera inn á strikuna, leggja upp til Trónda Kragesten og skjóta sjálvur.

JL: Eg vildi sagt tveir leikarar. Marian Cirloganescu, málverjin, sum hevur staðið seg sera væl seinastu árini og serliga í so týðandi dystum. So má eg nevna síðumannin hjá mær her, David Edvardsen. Hann kann skjóta nøkur avgerandi mál, so tað er umráðandi, at eg fyrireiki meg væl áðrenn.

Claus Rasmussen hevur verið venjari hjá Neistanum í fleiri ár. Er tað ein fyrimunur hjá StÍF?

JL: Nei, tað haldi eg ikki. Vit spæla heilt øðrvísi nú. Hann kennir sjálvsagt allar leikararnar, men vit hava eisini Jacob Jónsson í hópinum, sum stóð á odda fyri StÍF í fjør. So nei, tað er ikki ein fyrimunur.

DE: Tað er hvørki ein fyrimunur ella ein vansi. Claus stendur ikki fyri sama hondbóltsspælinum, sum hann gjørdi í Neistanum.

Hvat er størsta styrkin og størsti veikleikin á hinum liðnum?

JL: Tað eru serliga á tveimum økjum, at StÍF eru sterkir. Fyrst og fremst eru tað Danni Syhler, David Edvardsen og Sveinur Justinussen. Teir lyfta støðið hjá hvør øðrum, og StÍF hevði als ikki riggað, um eingin av teimum var við. Og so eisini snarálopini hjá teimum. Tað er ein stórur veikleiki, at teir ikki hava serliga breiðan hóp. Útskiftararnir megna ikki at fylla plássini eftir stuðulsleikarunum.

DE: Breiddin á hópinum er sjálvsagt ein styrki hjá Neistanum. Teir eru sera kvikir, sum jú er ein fyrimunur, serliga í mótálopum. Jacob er altíð tryggur í málinum. Neistin hevur nógvar einstaklingar, og tað meti eg verða ein veikleiki. Verjuspælið er eisini sera skiftandi, og teir mugu frøast um at hava Jacob í búrinum.

Til seinast Jacob Larsen og David Edvardsen – hvør verður føroyameistari í 2008?

JL: Vit vinna. Liðini eru á sama støði, men vit hava breiðara hópin, og tað verður avgerandi.

DE: Tað verður sjálvsagt StÍF. Vit hava staðið fyri bestu avrikunum í ár, og vit fara nú at staðfesta okkara støðu sum Føroya besta hondbóltsfelag.